## Ronaldo kann seta met

Bara trý mál er brasilski Ronaldo frá at skriva seg í søgubøkurnar sum mest skorandi spælarin í HM-søguni. Ronaldo, sum longu eigur tvey HM-gullmerki, kom ongantíð á vøllin, tá hann sum 16 ára gamal var partur av brasilska HM-hópinum í 1994. Í 1998 skeyt hann fýra mál, tá talan gjørdist um silvur, og í 2002 skeyt hann átta mál, tá talan aftur gjørdist um gull til Brasil. Mest skorandi spælarin í HM-søguni er týski Gerd Müller, sum í 1970 og 1974 skeyt 14 mál. Flestu málini í einum endaspæli skeyt franski Just Fontaine, sum í 1958 skeyt ikki færri enn 13 mál.

**-mørk**



## Oddsini frá Dansk Tipstjeneste

***Hvør fer víðari úr bólki F***

| | |
|---|---|
| Brasilia & Kroatia | 1,45 |
| Brasilia & Australia | 3,10 |
| Brasilia & Japan | 4,50 |
| Kroatia & Australia | 19,00 |
| Kroatia & Japan | 30,00 |
| Australia & Japan | 80,00 |

## Bólkur F

### AUSTRALIA

**Málverjar**
Mark Schwarzer
Ante Covic
Zeljko Kalac

**Verja**
Lucas Neil
Craig Moore
Tony Popovic
Michael Beuchamp
Mark Milligan

**Miðvøllur**
Tim Cahill
Brett Emerton
Josip Skoko
Harry Kewell
Stan Lazaridis
Vince Grella
Scott Chipperfield
Luke Wilkshire
Mile Sterjovski
Marco Bresciano

**Álop**
Jason Culina
Mark Viduka
John Aloisi
Archie Thompson
Joshua Kennedy

### BRASIL

**Málverjar**
Nelson Dida
Ceni Rogerio
Julio César

**Verja**
Cafú
Ferreira Lucio
Juan
Roberto Carlos
Cicinho
Anderson Luisao
Cris
Gilberto

**Miðvøllur**
Ferreira da Rosa Emerson
Kaká
Jose Ze Roberto
Gilberto Silva
Carlos Mineiro
Pernambucano Juninho
Luis Ricardinho

**Álop**
Ronaldinho
Fred
Robinho
Adriano
Ronaldo

### Japan

**Málverjar**
Seigo Narazaki
Yoichi Doi
Yoshikatsu Kawaguchi

**Verja**
Teruyuki Moniwa
Yuichi Komano
Tsuneyasu Miyamoto
Koji Nakata
Keisuke Tsuboi
Akira Kaji
Yuji Makazawa

**Miðvøllur**
Yasuhito Endo
Hidetoshi Nakata
Mitsou Ogasawara
Shunsuke Nakamura
Alessandro Santos
Takashi Fukunishi
Junichi Inamoto
Shinji Ono

**Álop**
Naohiro Takahara
Seilchiro Maki
Atsushi Yanagisawa
Masashi Oguro
Keiji Tamada

### KROATIA

**Málverjar**
Stipe Pletikosa
Joseph Didulica
Tomislav Butina

**Verja**
Josip Simunic
Robert Kovac
Igor Tudor
Dario Simic
Mario Tokic
Stjepan Tomas
Anthony Seric

**Miðvøllur**
Darijo Srna
Jurica Vranjes
Marko Babic
Nico Kovac
Luka Modric
Ivan Leko
Jerko Leko
Niko Kranjcar

**Álop**
Dado Prso
Ivan Klasnic
Iviva Olic
Bosko Balaban
Ivan Bosnjak

# Samba-kongurin



*Eingin ivi er um, hvør er heimsins besti spælari júst nú. Ronaldinho er samba-kongurin, sum skal fáa brasilska spælið á rætta lagið, nú teir fara at dyrgja eftir sætta HM-heitinum*

*Mynd: Scanpix*

**Á hædd við Pelé og Maradona. Kanska. Undir øllum umstøðum er hampuliga breið semja um, at Ronaldinho í løtuni er heimsins besti fótbóltsspælari. Megnar hann eisini at prógva hetta í HM-kappingini, er hann nærum vísur í legendu-status**

**HM BÓLKUR F**
*Jákup Mørk*
*jakup@sosialurin.fo*

Heimsins stjørsta fótbóltstjóð. Tað er etikettin, sum aloftast verður heft á Brasil, og heilt skeivt er tað nú heldur ikki. Við fimm HM-gullmerkjum og luttøku í hvørjum tí einasta endaspæli, sum hevur verið á skránni, stendur einki annað lið teimum gulu kurl. Og at teir aloftast – og mest sum hvørja ferð síðani 1982 – hava verið roknaðir sum favorittar, er bara ein veruleiki, sum spælararnir hava lært seg at liva við. Og alt annað vildi kanska eisini verið at rokna sum landasvik og brot á alla brasilska sjálvsfatan, um tú spyrt teir mongu áskoðararnar, sum altíð fylgja teimum gulu.

### Vil seta sítt merki

Hóast talið av stjørnum er so stórt, sum sjáldan sæð áður á brasilska landsliðnum, so er tó ein, sum lýsir so nógv bjartari enn allar aðrar.

26 ára gamli Ronaldinho hevur seinastu trý árini verið roknaður sum ein av teimum heilt stóru í alheims fótbóltssøguni. Tvær ferðir á rað er hann heiðraður av FIFA sum besti spælarin í heiminum, og higartil hevur hetta fótbóltsárið givið honum spanska meistaraheitið og UEFA Champions Leuga-heitið visit-kortið. Maradona hevur sjálvur rópt hann fyri sín náttúrliga arvtakara, meðan Romari hevur rópt landsmannin fyri besta spælaran, sum heimurin hevur sæð, síðani Pelé stillaði gaggurnar.

Og hóast hann longu fyri fýra árum síðani eisini kundi skriva heimsmeistari á kortið, so er einki at ivast í, at Ronaldinho sjálvur vil hava ein størri leiklut hesaferð. Fyri fýra árum síðani vóru tað fyrst og fremst Rivaldo og Ronaldo, sum vóru stóru profilarnir. Ronaldinho sjálvur gjørdist kanska ein av hetjunum, tá hann úr stórari fjarstøðu fullkomuliga snýtti David Seaman í enska málinum, men tá hann í sama dysti varð rikin av vøllinum, setti hetta ein svartan blett á hansara HM.

Tann blettin ynskir Ronaldinho meira enn nakað at vaska av sær, og kann hann tað, so er einki at ivast, hvar størsta tøkkin fer.

Longu sum átta ára gamal misti Ronaldinho pápa sín, og á yrkisleiðini eru hópur av tankum send móti himni. Nakað sum eisini er sjónligt, tá brasilski bóltsnillingurin feirar mál síni við biðandi eygum, sum eru vend móti himni.

### Tungur leiklutur

Við ella uttan Ronaldinho, so er framvegis greitt, at Brasilia altíð fer at teljast millum favorittarnar. Carlos, Cafú, Kaka, Ronaldo, Adriano, Robinho, Edmilson, Dida… Røðin av stjørnunøvnum tykist óendalig, og største uppgávan hjá landsliðsvenjaranum er uttan iva, at fáa liðið at rigga sum eina eind.

Carlos Alberto Parreira er kanska júst rætti maðurin at leiða liðið í so máta. Trýstið á ein brasilskan landsliðsvenjara er øgiligt, men hetta kennir Parreira alt til, nú hetta er triða ferðin, at hann stendur við stýrisvølin. Samstundis er hann eisini væl lýddur millum vanligu viðhaldsfólkini, tí honum dámar brasilska samba-stílin, heldur enn kontrollerandi stílin, sum Brasil onkra tíð áður hevur roynt seg við. Trupulleiki hjá Parreira er so, at tað ofta kann koma andsøgn ímillum tað at undirhalda og tað at vinna.